Drúgt vikuskifti

Fýri dystir í bestu kvinnudeildini verða leiktir um vikuskiftið, umframt at fyrsta av fýra hálvfinalum í Coca-Cola kappingini er á skránni

HONDBÓLTUR – KVINNUR
Jákup Mørk

Hóast nógv fokus hevur verið vent móti komandi dystunum hjá VÍF-kvinnunum, so merkir hetta á ongan hátt, at restin av hondbóltskappingini liggur still av hesi orsøk.

Tvørtur ímóti. Hetta vikuskiftið tykist gerast eitt hitt mest umfatandi hondbóltsvikuskifti hetta kappingarárið, og tað av fleiri orsøkunum.

Umframt teir báðar dystirnar hjá VÍF, verður fult umfar spælt sunnudagin. Har afturat skal útsetti dysturin millum Sóljuna og StÍF frá grundspælinum avgreiðast, umframt at Stjørnan og VB fara undir fyrru hálvfinaluna sínamillum.

Steypakappingin

Fyri at taka tað seinasta fyrst, so er talan um endurtøku frá í fjør, tá Stjørnan og VB tørna saman í Coca-Cola kappingini.

Í fjør vann VB báðar uppgerðirnar í steypakappingini, og vágbingar seta helst nøsina upp ímóti at vinna sær finalusessin triðja árið á rað.

Stjørnan er kanska eisini til at tosa við í løtuni, og í øllum førum vann VB seinasta dystin millum liðini bæði, men avrikið hjá Stjørnuni seinasta vikuskifti kundi tó bent á, at tær nú eru um at vinna seg úr aldudalinum, sum liðið hevur verið. Har afturat hava klaksvíkingarnir tvey ár á rað tapt hálvfinaluna í steypakappingini, og ivaleyst er hetta nakað, sum tær nú vilja broyta.

Landskappingin

Í landskappingini er dysturin leygardagin sum sagt útsetta uppgerðin ímillum Sóljuna og StÍF.

Hóast tað í prinsippinum bert er hitt eina stigið, sum spælt verður um, so skerst ikki burtur, at hetta væl kann verða dysturin, sum í evstu løtu avgerð spurningin um upp- og niðurflyting.

Sum vit áður hava nevnt, so hevur dysturin tvær reisur verið útsettur, og so er bert at vóna, at grundspælið hjá kvinnunum kann avgreiðast endaligt leygardagin.

Sunnudagi eru so tríggir dystir á skránni, og skulu tá tey fýra liðini, sum dystast leygardagin aftur royna seg, tó at blandingin er heldur øðrvísi. Tá fer Sóljan á vitjan hjá Stjørnuni í einum dysti, har heimaliðið er risa stórur favorittur, meðan VB eisini er stórfavorittur móti StÍF, tó at tann dysturin verður á Skála.

Seinasti dysturin verður í Havn, har grannarnir báðir, Neistin og Kyndil fara at avgreiða triðju lokaluppgerðina í vetur. Her hevur Neistin havt yvirtakið higartil, men rakar Kyndil rætta dagin, so kann so væl vera, at tær endiliga aftur fáa tvey stig frá teimum bláu.

Hjá kvinnunum tykist størsti spurningurin vera, hvørt Stjørnan endiliga fær vunnið seg í steypafinaluni, eftir at tær tvey ár á rað hava tapt í hálvfinaluni

Fleiri spurningar

Sum vant eru oddaliðini favorittar, men á Skála tykist ein av avgerandi dystunum um bronsumerkini at vera sunnudagin

HONDBÓLTUR – MENN
Jákup Mørk

Fult umfar er á skránni í hondbóltskappingini hjá monnum hetta vikuskiftið, og ikki minst er tað stóra óvissan um bronsumerkini, sum skapar spenningin í løtuni

Greiðir favorittar

Í dystunum um bronsuna eru tað bara teir báðir gullbiðlarnir, VÍF og Neistin, sum ikki taka lut, og tey eru sjálvsagt favorittar, tá tey skulu royna seg.

Longu leygardagin leggur VÍF fyri, tá teir á heimavølli skulu takast við kollfirðingar. Ein uppgerð, sum ofta hevur givið bæði harðar og spennandi dystir, men har vestmenningar aloftast hava verið við yvirlutan.

Verður sæð burtur frá Neistanum, so hava vestmenningarnir tó ikki havt rætta spælið frammi seinstu tíðina, og so er spurningurin, um VÍF nú veruliga hevur fingið glið á aftur, ella um talan mikukvøldið bert var eitt serstakt fyribrigdi.

Somuleiðis er Neistin favorittur, tá teir í Havn fara at takast við Kyndil. Neistin vann báðar dystirnar móti grannunum í grundspælinum, og mett eftir leikarahópunum, so eigur sigurin eisini at vera vísur hesaferð.

Sum hjá VÍF, so er spurningurin her helst, hvussu oddadysturin mikukvøldið hevur ávirka, og her líkist tað einum »antn ella«. Antin fer Neistin nú niður við flagginum, soleiðis at teir veruliga eru til at tosa vi hjá hinum liðunum, ella vilja teir nú prógva, at mikukvøldið var eitt mistak, og um tað hendir, so kann tað gerast alt annað enn stuttligt at vera mótstøðulið teirra.



Fram um hini verða StÍF og H71 mett sum biðlar til bronsumerkini, og júst hesi bæði lið tørna saman á Skála sunnudagin

Bronsan

Á pappírinum tykist mest spennandi uppgerðin vera á Skála, har H71 vitjar StÍF. Hetta eru liðini, sum fram um hini hava verið mett sum bronsukandidatar, men stóri trupulleikin higar til hevur verið, at hvørki teirra hevur havt nakað støðugt spæl.

Strandingar hava tó ofta havt fyri at spælt væl eftir vetrarsteðgin, so tað bendir kanska á ein heimasigur, og skal rætt verða rætt, so sannførdi avrikið hjá hoyvíkingum fyri viku síðani als ikki um, at hoyvíkingar fara at gera tær nógvu skreytirnar í endaspælinum.

Dystir um vikuskiftið

Hondbóltur

1. deild kvinnur

12.01.02	16.00	Sóljan	-	StÍF
13.01.02	14.30	Neistin	-	Kyndil
13.01.02	16.00	Stjørnan	-	Sóljan
13.01.02	14.30	StÍF	-	VB

1. deild menn

12.01.02	16.00	VÍF	-	KÍF
13.01.02	16.00	Neistin	-	Kyndil
13.01.02	16.00	StÍF	-	H 71

Coca-Cola kappingin, kvinnur

12.01.02	17.00	Stjørnan	-	VB

Europa-Cup, steypavinnarar

11.01.02	18.00	VÍF	-	Hellas
13.01.02	16.00	Hellas	-	VÍF

Flogbóltur

Meistaradeild kvinnur

12.01.02	13.00	Fleyr	-	Dráttur
12.01.02	13.00	Mjølnir	-	ÍF
13.01.02	13.00	Fleyr	-	ÍF
13.01.02	14.00	Dráttur	-	Mjølnir

Meistaradeild menn

12.01.02	15.00	Mjølnir	-	ÍF
12.01.02	15.00	Fleyr	-	SÍ
13.01.02	14.00	SÍ-Mjølnir	-	ÍF

Aftur gerandisdagur

Eftir ein ikki so øgiliga drúgvan jólasteðg fer landskappingin í flogbólti nú aftur í gongd. Og heili sjey dystir verða í meistaradeildini hetta vikuskiftið

FLOGBÓLTUR
Emil Lisberg Jacobsen

Eftir ein jólasteðg við øllum tí sum hartil hoyrir er tað nú gerandisdagur aftur í flogbóltskappingini, og frá nú av og fram til seinastu dystirnar 9. mars verður flogbóltur hvørt vikuskifti og onkuntíð eisini mitt í viku.

Stigini hjá øllum liðunum eru býtt í helvt, og frá nú av ræður tað um at verða støðugur. Bara ein taptur dystur kann kosta dýrt.

Mjølnir-kappingin síðsta vikuskifti var byrjanin til seinnu helvt av kappingarárinum, og í dag byrjar so landskappingin eisini aftur.

Dráttur skal reisa seg

Í kvinnudeildini skulu tríggir dystir spælast, og øll liðini í kappingini uttan oddaliðið TB skulu á vøllin. Tveir dystir verða í dag, og í morgin verður so tann triði dysturin, og við tað at TB ikki spælir, fer munurin í toppinum at minka.

Eftir at Fleyr-kvinnurnar hava ligið niðast so at siga alla tíðina frá tí kappingin byrjaði, megnaðu tær í síðsta dystinum áðrenn jól at koppa ÍF og harvið troka seg framum kvinnurnar úr Fuglafirði, sum nú eru aftast. Í dag fær Fleyr vitjan av Drátti, sum var nær við at vinna Mjølnir-kappingina, og sum enn er føroyameistari. Um Drátturkvinnurnar eru komnar yvir vónbrotið í Klaksvík síðsta sunnudag, eiga tær at vera nóg sterkar at vinna móti Fleyr.

Men tá liðini hittust í Havn í grundspælinum, vann Fleyr heldur óvæntað 3-2, so her er einki avgjørt frammanundan.

Tað er tað heldur ikki í Klaksvík, har Mjølnir tekur ímóti ÍF, men hevur Mjølnir ein góðan dag, eiga tær at kunna gera av við ÍF, sum er farið bóltandi niður eftir stigatalvuni í seinastuni. Mjølnirkvinnurnar hava eisini nakað at hevna, tí í grundspælinum vann ÍF 3-2 í Klaksvík.

Í morgin møtast so Dráttur og Mjølnir á Giljanesi. Um Mjølnir vinnur móti ÍF leygardagin, kunnu tær við einum sigri í Vágunum koma upp á sama stigatal sum TB, men hinvegin kann Dráttur eisini við tveimum sigrum hetta vikuskifti minka munin upp til TB úr fimm niður í eitt stig. So tað stendur nógv uppá spæl.

Og dysturin í grundspælinum millum Fleyr og ÍF, ið fekk eitt so drúgt eftirspæl, sum endaði við, at dysturin skuldi spælast umaftur, verður nú loksins avgreiddur. Tað hendir í Gundadalshøllini í morgin klokkan 13.00. Her er í roynd og veru bara eitt stig at spæla um, men so jøvn sum støðan í botninum er í løtuni, kann hetta eina stigið eisini fáa stóran týdning, tá roknað verður saman eftir lokna kapping.

Lagnudystur í Havn?

Eisini hjá monnunum er nógv at spæla um, og higartil hevur kappingin lagað seg soleiðis, at tað er sera torført at spáa um, hvussu leikur fer at fara frá nú av. Fram byrjaði kappingina væl, men hjá teimum hevur gingið striltið í seinastuni, og tí er SÍ nú fremsti favorittur til FM-heitið. Men tað er langt eftir á mál, og teir kunnu fáa tað strævið í dag í Havn móti Fleyr, sum hevur ryggin móti múrinum. Góða gongdin móti endanum av grundspælinum fekk ein bráðan enda, tá havnarmenninir taptu móti botnliðnum ÍF í fyrsta dystinum av endaspælinum. Tað kom dátt við, og um SÍ vinnur í dag, eru teir longu fimm stig framman fyri Fleyr, og tað er nógv - so nógv at hetta kann gerast lagnudysturin hjá havnarliðnum.

Í Klaksvík møtast Mjølnir og ÍF, og eins og við dystinum í Havn sær hetta út til at vera ein uppgerð, sum kann fara báðar vegir. Talan er um tvey tey niðastu liðini í deildini, og við einum sigri kann ÍF fyri fyrstu ferð í hesi kappingini koma av botnpláss inum. Eitt tap fer hinvegin at gera teir enn meira einsamallar í botninum, meðan Mjølnir so samstundis nærkast hinum liðunum. ÍF hevur júst vunnið Mjølnir-kappingina og harvið tryggjað sær pláss í steypafinaluni. Spurningurin er so, um teir - ótilvitað - eru nødgir við tað, ella um teir ætla sær at gera enn ein vørr í landskappingini.

Eins og hjá kvinnunum hittast so vágaliðið og klaksvíksliðið í Vágunum sunnudagin. SÍ tekur ímóti Mjølni, og á pappírinum líkist tað einum sigri til SÍ. Men úrslitini dagin fyri kunnu hava gjørt onkrar rættingar á tað pappírið...

Tey sum hava hug at hyggja at flogbólti mitt í viku eisini, fáa nú møguleikan, tí hóskvøldið verður grannauppgerð millum Fram og Fleyr. F y r i Fram verður hetta ein ógvuliga týdningarmikil dystur, og tað kann tað eisini gerast fyri Fleyr - tað veldst um úrslitið hjá teimum móti SÍ í dag.

Tað hevur tikið sína tíð, men nú verður hann loksins avgreiddu. Dysturin frá millum kvinnuliðini hjá Fleyr og ÍF verður leiktur hetta vikuskiftið

Flogbóltsstøður

Meistaradeild, kvinnur

		d	v	-	t	v sett	t sett	+/- sett	stig
1	TB	9	8	-	1	25	7	18	9
2	Mjølnir	8	5	-	3	18	14	4	5
3	Dráttur	9	4	-	5	17	19	-2	4
4	Fleyr	8	2	-	6	7	21	-14	3
5	ÍF	8	2	-	6	14	20	-6	2

Meistaradeild, menn

		d	v	-	t	v sett	t sett	+/- sett	stig
1	SÍ	9	7	-	2	23	11	12	8
2	Fram	9	6	-	3	22	16	6	6
3	Fleyr	9	5	-	4	20	18	2	5
4	Mjølnir	8	3	-	5	15	18	-3	3
5	ÍF	9	1	-	8	9	26	-17	2

Hondbóltsstøður

1. Deild kvinnur

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	VÍF	1	1	-	0	-	0	381	232	149	14
2	Stjørnan	1	1	-	0	-	0	343	276	67	11
3	Neistin	1	0	-	1	-	0	279	243	36	9
4	VB	1	0	-	1	-	0	299	312	-13	7
5	Kyndil	1	0	-	0	-	1	293	339	-46	3
6	Sóljan	1	0	-	0	-	1	233	348	-115	2
7	StÍF	0	0	-	0	-	0	200	278	-78	1

1. Deild menn

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	VÍF	1	1	-	0	-	0	378	310	68	13
2	Neistin	1	1	-	0	-	0	417	344	73	12
3	StÍF	0	0	-	0	-	0	326	315	11	6
4	H71	1	0	-	0	-	1	353	372	-19	6
5	KÍF	1	0	-	0	-	1	340	381	-41	4
6	Tjaldur	1	0	-	0	-	1	315	360	-45	4
7	Kyndil	1	1	-	0	-	0	301	348	-47	4

Máltindarnir

Kvinnur:

Simona Dziugyte	Stjørnan	115	(32)
Asta Petrauskine	Sóljan	111	(15)
Lotte Sørensen	Kyndil	99	(43)
Gabriella Fekete	VB	90	(21)
Ioana Rápa	VÍF	90	(23)
Joan M. Joensen	Stjørnan	71	(2)
Regina Radó	VB	67	(15)
Katrin á Neystabø	Neistin	63	(31)
Ileana Manulescu	StÍF	59	(8)
Sóley Mikkelsen	VÍF	58	(10)
Nicoleta Radu	VÍF	56	(1)
Annika Ljósstein	Kyndil	56	(9)
Anna K. Samson	Stjørnan	54	(1)
Jacklin Durhuus	VÍF	54	(4)
Andrijana Milodanovic	Stjørnan	52	(6)

Menn:

Jacob Jónsson	Neistin	85	(9)
Heini Joensen	Neistin	85	(25)
Costin Dumitrescu	StÍF	85	(26)
Bjarni Wardum	H71	81	(17)
Høgni Klein	Kyndil	76	(3)
Dragisa Stojovic	Tjaldur	75	
Halgir Dahl Olesen	H71	75	(10)
Finnur Hansson	H71	73	(20)
Sámal Joensen	VÍF	72	(13)
Dorica Tomic	KÍF	68	(17)
Ingi Olsen	VÍF	66	(8)
Iljan Topic	KÍF	63	
Hans Áki Dal-Christiansen	Neistin	63	(6)
Áki Olsen	VÍF	58	(9)
John Petersen	Neistin	55	(1)